62°N
Hoydalsvegur 17
Tórshavn

+298 34 00 00
booking@62n.fo
62n.fo



# Námsferð í Athen

Um tit veruliga vilja merkja og uppliva søguna í Grikkalandi, so skulu tit umhugsa ein túr til Athen. Fólk hava búð í Athen í 3000 ár og tað var tann mest týdningarmesti býurin í fornøldini. Tað sæst aftur allastaðni í teimum mongu og bergtakandi toftunum, sum rnn standa eftir í dag.
Tit kunnu til dømis fara ein dagstúr til Akropolis metro støðina og har frá ganga tann 4 km langa túrin fram við ta træklæddu gongubreytini, ið kallast Arkæologi Promenaden, har mangir av teimum týdningarmestu merkislutunum eru.

Prísur fyri hvønn

**Úr 7.300 kr.**

*Tá minimum 20 ferðast saman

## Upplivingar og 'must see' í Athen

Athen hevur støð í heimsklassa, ið eru verd at síggja, og fleiri av hesum hava UNESCO heims arv stempul. Nógv av hesum kunnu tit uppliva, meðan tit eru til gongu ígjøgnum býin, meðan onnur krevja almennan transport ella leigubuss. Grikkaland hevur til dømis fleiri enn 2000 oyggjar – vitjið eitt nú oynna Aegina á einum túri ein heilan dag.
Um námsferðin skal vera sett í samband við eitt sindur av ítrótti, so kunnu tit eitt nú fara eina útferð á fjallasúkklum í tjóðarlundini á Mount Parnitha.
Í Athen eru gomlu gøturnar í gamla Plaka býarpartinum eisini eina vitjan verdar. Har kunnu tit fáa eina góða grikska máltíð, samstundis sum tit eisini burdu sæð vaktarskiftið á Syntagma plássinum. Syntagma er harafturímóti heimstaður bæði fyri parlamentið og grikska forsetan.

## Tín ferðaráðgevi



**Guðrun Hansdóttir**

+298 34 00 00
gudrun@62n.fo







62°N
Hoydalsvegur 17
Tórshavn

+298 34 00 00
booking@62n.fo
62n.fo

## Faklig skrá á tykkara námsferð í Athen

Hava tit nógv fokus á tð fakliga á tykkara námsferð? Mangla tit íblástur, so hjálpa vit fegin við hesum. Søga, list og mentan eru sjálvandi uppløgd evnir men tað eru eisini møguleikar fyri ítrótti. Vit kunnu eisini viðmæla eina vitjan á einum skúla ella hjá onkrum hjálparfelagskapi.

- Tað er eitt 'must' at vitja Akropolis, tað vælkenda flatað bergið mitt í Athen, har millum annað Akropolis listasavnið og Parthenon templið liggur.
- National Arkæologiska listasavnið í Athen, við yvir 20.000 útstillingum, ið geva ein breiðan kunnleika um fornøldina, er eisini eina vitjan verd.
- 300 metrar frá Akropolis liggur New Acropolis listasavnið, har tit eisini kunnu uppliva leivdir frá gamla Grikkaland, framvíst á ein nútíðar hátt.
- Vitjið Olympiska stadion
- Tann fyrrverandi politiski miðdepilin og torgið Agora, var einaferð hjartað í Athen. Í dag kann man síggja leivdirnar av hesum.

# Gisting í Athen

Flestu bólkar velja at búgva á standard hotellum tá tey fara á námsferð til Athen. Vit samstarva við fleiri ymisk hotelir, og øll hava onkrar serliga fyrimunir. Tey flestu hotellini liggja sentralt í forhold til søguligu støðini í býnum. Tit kunnu eitt nú búgva í gangifrástøðu frá National listasavnið, við Plaka býlingin ella á Omónia staðnum. Besta staðsetingin at gista á er alt eftir hvørjar ætlanir og ynskir tit hava, og her finna vit saman júst tað rætta fyri tykkum.



Mitt í Plaka økinum

### Hotel Apollo

- Staðseting nær við Plaka
- Útsýnið til Akropolis
- Ókeypis Wi-Fi



Við svimjihyli

### Hotel Dorian Inn

- Útsýnið til Akropolis
- Svimjihylur
- Ókeypis Wi-Fi



Takterassa við útsýnið yvir Athen

### Hotel Exarchion

- Góða staðseting
- Nær við metro
- Ókeypis Wi-Fi

# Íroknað prísinum

- Ferðaseðlar úr Vágum til Athen
- Øll ferðaavgjøld
- Gisting í 7 nætur
- Morgunmatur
- Wi-Fi
- 24 tímars døgntænasta

### Eyka tænastur

- Bussflutningur av flogvølli til hotel t/r
  úr 320 kr fyri hvønn
- Útferðir
  úr 1.500 kr fyri hvønn
- Gisting í Kastrup
  úr 500 kr. fyri hvønn*

*Tá 8 gista í sama kamari